**Løgtingsins Fíggjarnevnd**
**Ruth Vang, formaður**
**Bárður Nielsen, næstformaður**
**Helena Dam á Neystabø**
**Kristin Michelsen**
**Pauli Trond Olsen**
**Bill Justinussen**
**Høgni Joensen, skrivari**

Saltangará, 15. oktober 2018.

**Viðv. fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019:**

Leiðslan í Bláa Krossi Føroya hevur lisið fíggjarlógaruppskotið fyri 2019. Umboð fyri leiðsluna vóru eisini í løgtingssalinum undir viðgerðini av fíggjarlógini, tá hon bleiv løgd fram fyrst í oktober í ár.

Tað er við gleði, at vit staðfesta, at Blái Krossur Føroya og Blákrossheimið framvegis eru á uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2019. DAT Ung, sum er viðgerð fyri ung millum 15-18 ár og sum er virksemi undir Blákrossheiminum, hevur fingið økta játtan, og hetta fegnast vit stórliga um.

Samstundis mugu vit staðfesta, at tað tykist sum at bland er komið í hugtøkini hjá støðutakarunum, tí Blákrossheimið og Blái Krossur Føroya eru ikki sami stovnur og virka á hvør sínum øki við hvør sínum játtanum. Vit skulu í hesum sambandi royna at útgreina virkisøkini, soleiðis at ongin ivi skal vera um, hvør ger hvat, og at vit arbeiða á hvør sínum øki.

## Blái Krossur Føroya

Blái Krossur Føroya er ein sjálvstøðugur limafelagsskapur, sum m.a. hevur til endamáls at hjálpa menniskjum, ið eru illa stødd av rúsdrekkaávum, at fyribyrgja rúsevnasmisnýtslu, at virka fyri eini rúsfríari lívsáskoðan og rúsfríum umhvørvi o.a.

Blái Krossur Føroya samstarvar við International Federation of the Blue Cross og góðtekur tess grundreglur. Sí annars viðtøkur felagsskapsins á heimasíðu okkara, blakross.fo.

Heiðavegur 32 FO-600 Saltangará Faroe Islands Phone +298 770 700
blakross@blakross.fo www.blakross.fo

Umframt inntøkurnar gjøgnum limagjaldið, so fíggjar Blái Krossur Føroya sítt virksemi umvegis Blákross-Búðin og Endurnýtsluhandlar, og eru hesir staðsettir í Saltangará, Miðvági, Tórshavn og á Tvøroyri. Afturat hesum inntøkunum skipar Blái Krossur Føroya fyri einari árligari landsinnsavning, ið hevur stóran týdning fyri okkara virksemi.

Umframt vanliga, sjálvfíggjaða virksemið fær Blái Krossur Føroya árliga stuðulsjáttan á løgtingsins fíggjarlóg, sum er markað til *Tiltøk móti rúsdrekkamisnýtslu (upplýsing)* og til *Umsorganarheimið í Tórshavn.*

Vit hava fyrr í ár á fundum og gjøgnum skrivligar umsóknir til almennu myngugleikarnar víst á, at vit hava ítøkiligar ætlanir at víðka um og broyta okkara tilboð til tey, sum hava ella hava havt rúsevnatrupulleikar og familjur teirra.

Hetta ætla vit at gera gjøgnum tvey høvuðsátøk, ið hoyra ávikavíst til Fyribyrgingar-deildina og Sosialu Eindina hjá Bláa Krossi Føroya:

- økt virksemi undir kenda heitinum "Øll hava rætt til góð barnaár"
- víðkað tilboð gjøgnum half-way-house

Hvørki av hesum ætlaðu átøkum eru á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2019. Vit høvdu annars varhugan av, at politiski viljin var til staðar at fíggja hetta økta virksemið hjá okkum.

**Blákrossheimið**

Raksturin av Blákrossheiminum á Nesi verður fíggjaður gjøgnum játtan á løgtingsins fíggjarlóg. Blái Krossur Føroya eigur bygningin, ið Blákorssheimið leigar. Játtanin til DAT-Ung er viðgerð til ung millum 15-18 ár. Í Fíggjarskipan Landsins/Gjaldstovuni hevur DAT-Ung egið stovnsnummar undir Blákrossheiminum.

**Blái Krossur Føroya - játtanin í 2019**

Leiðslan í Bláa Krossi Føroya hevur, út frá fíggjarlógarviðgerðini í løgtinginum fyrst í oktober, varhugan av, at politisku støðutakararnir møguliga ikki vita rættuliga, at økta og neyðuga játtanin til Bláa Kross Føroya ikki er ein játtan til ætlaðu økingina í virkseminum hjá Blákrossheiminum.

Vit vísa tí til tær umsóknirnar, sum Fyribyrgingardeildin og Sosiala eindin hjá Bláa Krossi Føroya hava sent til avvarandi myndugleikunum fyrr í ár, og vit heita tí á bæði Heilsumála-

Heiðavegur 32 FO-600 Saltangará Faroe Islands Phone +298 770 700
blakross@blakross.fo www.blakross.fo

og Almannamálaráðið um at fáa høvi at greiða frá okkara ætlanum á einum kunnandi fundi, har vit eisini fáa høvi at útgreina tað virksemið, sum vit hava søkt um játtan til.

Vit loyva okkum samstundis at minna á, at okkara royndir í Fyribyrgingardeildini við arbeiðinum "Øll hava rætt til góð barnaár", vísa, at tørvurin at lofta børnum og ungdómi, sum enn ikki hava góð og trygg barna- og ungdómsár, er ovurhondsstórur. Ivaleyst er hesin tørvur nógv størri, enn tað ber til at gera sær eina meting av, um ein ikki arbeiðir mitt ímillum hesi børn, sum líða so nógv, tí tey av foreldranna rúsevnamisnýtslu júst ikki fáa rættin til góð barnaár. Vit veita teimum hjálp. Okkara royndir vísa, at bæði børn, ung og familjurnar sum heild taka væl ímóti hjálp og ráðgeving. Virksemi hjá okkara Fyribyrgingardeild er økt nógv seinastu árini. Til okkara fyribyrgingararbeiði eru, sum er, ongir almennir pengar settir av.

Okkara royndir vísa eisini, at vit kunnu veita eitt munandi betri tilboð til nøkur av teimum, sum í dag stranda á Umsorganarheiminum, um vit fáa eina nýggja játtan til sokallaða half-way-house við staðseting í Tórshavn.

Samanumtikið ynskja vit at siga takk fyri allar tær játtanir, sum higartil eru veittar – og vit loyva okkum við allari virðing fyri fíggjarlógararbeiðinum at vísa á, at okkara ætlanir um økt virksemi eru tætt k ýttar at einari øktari játtan.

Vit eru fús at koma á fund við røttu viðkomandi at útgreina okkara ætlanir og ynski.

Vinarliga
**Blái Krossur Føroya**

**Dakko Petersen**
aðalskrivari

**Magni Højgaard**
deildarleiðari

Heiðavegur 32 FO-600 Saltangará Faroe Islands Phone +298 770 700
blakross@blakross.fo www.blakross.fo